# Kingo og Evert Taube í Miðlahúsinum



*Petur og Niels, sum týskvøldið fara at syngja í Miðlahúsinum*




*Hermann Jacobsen, sáli gava Evert Taube vísunum nakað heilt serligt. Týskvøldið fara Petur og Niels at tríva í somu vísur*

TÍÐINDASKRIV

Týskvøldið 20. desember klokkan 20 fara Petur J. Eliasen (Lylli) og Niels Midjord at syngja Evert Taube vísur og kingosálmar í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Petur og Niels eru partur av sangbólkinum Kingomenn.

Tiltakið í Miðlahúsinum er m.a. í sambandi við, at Kingomenn herfyri góvu út eina eskju við fýra fløgum við kingoløgum. Føroyski mentanararvurin verður her blandaður saman við Eveert Taube løg, ið serliga í tulkingini hjá Herman Jacobsen, sála hava fingið eitt serpláss í føroysku tilvitskuni. Tiltakið í Miðlahúsinum varir í umleið ein tíma.



*Niels Midjord fær helst mong at fara av húsum oman í Vágsbotn*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 49 2005

# Lækkingin í oljuprísinum steðgað

MARKNAÐARRÁK

Eftir ódnina Katrinu og heilt til byrjanina av desembur lækkaði prísurin á Brentolju úr 70 dollarum fyri tunnuna í 52. Har steðgaði lækkingin á hesum sinni, og í farnu viku var hann uppi á 60 dollarum aftur. Størstu sveigini í oljuprísinum eru í løtuni orsakað av veðrinum. Veðurtíðindini úr USA hava boðað frá heitari veðri enn væntað. Tað minkar um væntaða oljutørvin, og hetta fær prísin at lækka. Hinvegin sær næstan út til, at marknaðirnir gerast kløkkir av, at tað kann vera kalt um veturin, og so hækkar oljuprísurin av tí. Í løtuni sær út til, at oljupríslækkingin er steðgað á hesum sinni, hóast veðrið framvegis kann fáa prísin at sveiggja báðar vegir.

## Lánsbrøv støðug

Lánsbrævarenturnar lækkaðu støðugt í farnu viku. 10-ára danska rentan lækkaði úr 3,41% í 3,34%. Av tí at sera lítið verður handlað í desembur, er ilt at meta um, hvussu renturnar flyta seg eitt so stutt tíðarskeið sum eina viku.

## Oljupartabrøv lækkaðu

Í miðal lækkaðu partabrøvini, ið eru skrásett á norðurlendsku keypsskálunum, í farnu viku. Mált við vísitalinum FTSE Norex 30, var lækkingin 0,4%. Høvuðsorsøkina til lækkingina áttu partabrøv tengd at oljuvinnuni. Millum annað lækkaði Norsk Hydro 4,3% og Statoil 2,9%. Fríggjadagin lækkaði prísurin á Brent olju 3,8%, og hetta er ein av høvuðsorsøkunum til, at oljutengd partabrøv lækkaðu í vikuni. Hóast lækkingina hava hesi bæði oljupartabrøvini staðið seg væl. Síðan ársbyrjan er Norsk Hydro er hækkað 50% og Statoil 67%. Av tí at lítil útlit eru fyri, at oljuprísurin fer at lækka munandi komandi tíðina, meta vit, at oljupartabrøv eisini kunnu standa seg væl framyvir.

Hesa vikuna

Hesa vikuna verða eyguni á fíggjarmarknaðunum vend ímóti USA. Haðani verða kunngjørd hagtøl fyri prísvøkstur, søluog privata nýtslu. Privata innlendis nýtslan er 2/3 av amerikanska búskapinum, og tí gevur nýtslan góðar ábendingar fyri bæði láns- og partabrævamarknaðirnar.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 620,49 | -1,6% | ↓ |
| JPY | 5,36 | 2,6% | ↑ |
| GBP | 1.100,19 | -0,6% | ↓ |
| NOK | 93,34 | -0,6% | ↓ |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,73 | 0,2% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 173,41 | -0,2% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 106,53 | -0,6% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 72,67 | 0,9% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*